Hús & Heim
snorri@sosialurin.fo



*Feðgarnir, Herleif og Julius Hammer gera klárt til at bjálva enn eini hús. Nógvur peningur er at spara við eini góðari húsabjálving*

*Mynd: Bárður*

# Tað loysir seg at bjálva húsini

**Enn eru nógv hús í Føroyum, ið ikki eru bjálvað, ella hava ov vánaliga bjálving. Hetta hevur nógv at týða fyri trivnaðin inni, men serliga nógv at siga fyri oljunýtsluna**

BJÁLVING
*Snorri Brend*

Sum gongdin er í dag, har oljuprísirnir bara hækka, er nógvur peningur at spara, um húsini eru væl bjálvað.

Tað kann tykjast mongum ein tvørlig uppgáva at fara undir at bjálva húsini. Mong hugsa um at skræða klædning og veggir niður fyri at sleppa framat, men hetta er als ikki neyðugt.

Øll hús kunnu nú bjálvast uttan stórvegis hóvasták. Tað tekur bert tveir til tríggjar dagar. Og so er tað bæði bíligt og dygdargott.

## Glasull og steinull

HÚSABJÁLVING hevur maskinur, ið snøgt sagt blása ull inn í veggirnar millum skins og hold, omaná loft og í gólv millum hæddir.

Arbeiðið fer fram á tann hátt, at hol verða borað í veggirnar ella gólvini. Holini eru uml. 8 cm. í diametur og verða borað við 60 — 100 cm. millum.

Síðani verður steinull við luft blást inn í holini. At enda verða proppar settir aftur í holini, so lítið og einki sæst eftir arbeiðið. Til ber at bjálva uttanífrá ella innanífrá, bæði timburhús og betonghús.

Hetta er ein sera góður háttur at bjálva húsini uppá, og sum eisini er nógv nýttur í londunum rundan um okkum.

Tilfarið, ið nýtt verður, er vælkenda og vælumtókta íslendska steinullin, men um viðskiftafólk heldur ynskja glasull, er tað eisini ein møguleiki.

## Sparingar

Spurt verður ofta um, hvussu nógv er at spara, eftir at ein hevur fingið húsini bjálvað.

Sum tummilfingurregul kann ein siga, at um húsini frammanundan eru óbjálvað, minkar oljunýtslan til upphiting millum ein triðing og eini helvt. Hetta vil siga at íløgan er spard inn aftur eftir 3 — 5 árum.

Steinull bjálvar eisini væl móti ljóði og er sera haldgóð móti eldi.

Tað vil so aftur siga, at eini vælbjálvað hús eru bílig at reka, hugnalig, friðarlig, tryggari og vaksa í virði.

## Royndir menn

Húsabjálving hevur 25 ára royndir innan bjálving, og við nútímans útgerð bjóðar virkið seg fram at loysa allar bjálvingaruppgávur hjá privatum, virkjum og stovnum.

Ynskja fólk fleiri upplýsingar, ber til at ringja 319309/519309 og fáa eitt prát og ein faldara sendandi. Eisini ber til at fara inn á heimasíðuna www.veyhe.com og fáa fleiri upplýsingar.

## Ein runnu kann elva til grannaklandur

**Tøl frá norska Konfliktrådet vísa, at grannar klandrast líka illa í ár sum teir gjørdu í fjør.**

Higartil í ár hevur ráðið verið við í seming í 198 málum, og tað eru eins nógv og í fjør. Flest málini koma ikki út til almenningin, men eitt teirra – tá ein lyfti Mercedes-bilin hjá grannanum upp í ein runn – fekk kortini nógva umrøðu í norskum fjølmiðlum. Flestu málini enda sum eitt langt kríggj, - ella í Konfliktrådet.

Tey 24 málini, sum ráðið í Oslo hevur viðgjørt í ár, snúgva seg í flestu førum um larm frá børnum og antennur.

Men "klassikarin" við stríðnum um runnin er aftur millum málini í ár, sum hetta dømið vísir:

Eitt húski byrjaði at argast inn á, at runnurin ella runnagirðingin hjá grannanum ikki var nóg vøkur, so tey kliptu bara runnin niður. Grannin setti ein nýggjan runn niður, men sum hini skjótt kliptu niður. Soleiðis hildu tey á í áravís við gróðurseting og klipping. At enda tók húsbóndin motorsagina fram og við harðari hond klipti runnin hálvan. Eftir tað kom løgreglan upp í leikin, og síðani endaði málið í Konfliktrådet.

Uppgávan hjá ráðnum var her at fáa frið og semju í lag millum partarnar. Í hesum førinum eydnaðist at fáa allan runnin tiknan burtur, soleiðis at grannarnir í felag kundu gróðurseta ein nýggjan runn sum varð felags ogn.

Ikki óvæntað hava hesir báðir grannarnir í dag góð viðurskifti hvør við annan.

- Teir verða helst aldrin bestir vinir, men teir eru vorðnir nóg góðir grannar til at kunna búgva lið um lið, og hava lagt hesa søguna í gloymibókina, sigur Gro Rossland, sum er leiðari í Konfliktrådet í Oslo.


Er tú kaldur?
- kanska átti tú at bjálva húsini!

**Húsabjálving**
Húsabjálving hevur maskinur, ið blása ull inn í veggirnar millum skins og hold, omaná loft og í gólv millum hæddir

**2 - 3 dagar**
So leingi tekur tað okkum at bjálva eini hús.

**Hví skal bjálvast?**
Eini bjálvað hús eru hugnaligari, friðarligari, hava betri inniklima og vaksa í virði.

**Hvat kann bjálvast?**
Vit bjálva útveggir, innveggir, skráveggir, gólv og loft. Øll hús kunnu bjálvast - bæði timbur- og betonghús.

**Spar**
Eini bjálvað hús nýta bara helvtina av tí oljuni, sum eini óbjálvað hús nýta. Kostnaðurin at bjálva er spardur eftir 3 - 5 árum.

HÚSABJÁLVING
www.veyhe.com
Postsmoga 1135 | Oman Mattalág 14 | Fo 110 Tórshavn | Tlf: 319309/519309